

# G SMINKAR

ómak við útsjóndini og harvið geva arbeiðsgevarum eina góða fatan av tær beinanvegin, staðfestir Hans Fróði.

Og tað er júst tað, sum hann dagliga hjálpir fólki við. At fáa tað innara at samsvara við tað uttara, og gera fólk meiri heilskapað við at vísa, hvør innari persónurin er ígjøgnum klæðir, hár og útsjónd sum heild.

– Arbeiðshátturin hjá einum Image Consultant er sum arbeiðshátturin hjá øðrum ráðgevum. Arbeiðið byrjar við einum inniligum ynski um broyting, og um tað ikki er til staðar, er arbeiðið nyttuleyst. Síðani verður broytingin førd út í lívið, og eg fylgi við kundanum, inntil hann klárar seg sjálvan, júst sum allir aðrir ráðgevar gera, greiðir Hans Fróði frá.

Hann sigur, at nógv tann størsti parturin av kundunum hjá honum eru mannfólk.

– Íslendsku mannfólkini eru vorðin ótrúliga tilvitað um, hvussu stóran týdning tað hevur, hvussu tú presenterar teg sjálvan. Og teir eru ikki bangnir fyri at broyta seg og forbetra seg, sigur hann.

## Einkisigandi?

Spurdur, um tað í longdini ikki kann gerast rættiliga einkisigandi bert at arbeiða við útsjónd og móta, svarar Hans Fróði, at tað heldur hann als ikki.

– Í Føroyum kann tað kanska tykjast sum hetta er tað bera tvætl. Men er tað tvætl at hjálpa fólki at gerast vælnøgd við seg sjálvi og geva teimum eitt størri sjálvsálit og sjálvsvirði? Eg haldi, at tað er eitt fantastiskt arbeiði, sum eisini er ótrúliga gevandi, slær Hans Fróði Hansen fast.

Arbeiðið er fjølbroytt og gevur honum møguleika at hitta nógv fólk. Hann arbeiðir fyri fyritøkur, har uppgávan er at skapa andlitið á fyritøkuni úteftir. Tað verður nevnt »Image branding«, og inniber at skapa og fullføra »look'ið« hjá fyritøkunum. Hann skal tá fyrireika seg væl og finna fram til tað, sum hóskar júst til ávísu fyritøkurnar.

Tá hann arbeiðir við privatfólki, sigur hann, at hann fær ein nýggjan vin fyri hvørja uppgávu, tí tað snýr seg í stóran mun um tryggleika og álit. Hann má læra fólkini at kenna, áðrenn hann kann hjálpa við útsjóndini og arbeiða við teirra »first impression«, sum Hans Fróði sjálvur málber seg.

Herfyri var hann eisini maðurin handan »Mr. Iceland« kappingina. Tá var hann um luttakararnar í eina viku, lærdi teir at ganga, flyta seg og bera seg at. Fyri tað arbeiðið fekk hann framúr góð skoðsmál.

Hann arbeiðir eisini fyri íslendsk bløð, har hann stendur fyri at gera makeovers og at skriva greinar um móta og rák. Hann svarar mótaspurningum, sum fólk senda til blaðið umframt at geva tips og góð ráð.

Hóast hann fyri tað mesta arbeiðir í Íslandi, so hava fólk um allan heim frætt um hann. Hann er nevniliga biðin at halda fyrilestrar fyri handilsfólkum t.d. í Suðurafrika, Ísrael , Pakistan. London, Amerika og á Kypern.

– Arbeiðið hjá mær er fevnir ógvuliga víða, og tað er fjølbroytt og spennandi. Eg haldi als ikki, at hetta er einkisigandi. Eg njóti veruliga hvønn einasta dag, slær hann fast.

## Forðingar á vegnum

Hans Fróði Hansen, 29 ára gamli leirvíkingurin, er um at sláa navn sítt fast innan mótaheimin. Hann hevði tveir dreymar, legði líka í, hvat onnur hildu, og nú eru bæði barndómsynskini gingin út. Hann er yrkisleikari í fótbólti og arbeiðir innan móta.

*Men hetta eru tvær yrkisleiðir, ið eru tiltiknar fyri at vera torførar at fóta sær í. Er hetta ikki ein trupul lívsleið?*

Hans Fróði ivast ikki í sínum svari.

– Mørkini, sum eru á vegnum, setur man ofta sjálvur. Nógv fólk hava ein dreym, men tey halda, at tað fer aldri at bera til, tí hvat nú um... og so finna tey uppá alt møguligt, sum kanska kann henda. Tey seta sjálvi avmarkingar, áðrenn tey yvirhøvur hava gjørt eina roynd. Tá gerst tað tungt og ómøguligt at náa málinum, heldur Hans Fróði.

– Tey flestu hava onkuntíð hildið, at tað hevði verið fantastiskt at gingið á reyða teppinum saman við hinum stjørnunum. Tey droyma, men suffa so og gloyma, at øll, sum eru á reyða teppinum, hava arbeitt ótrúliga hart fyri at koma á tað. Reyða teppið kemur ikki til nakran av sær sjálvum. Serliga ikki, um tú bara situr inni á kamarinum og bíðar eftir at onkur skal koma og varnast teg. Tað er galdandi innan tónleik, ítrótt, forrætning, ja, alt, sigur Hans Fróði. – Tú mást út at royna og at gera vart við teg, sigur hann.

Hann heldur tó, at tað kanska er serliga tungt at gera dreym til veruleika í Føroyum, tí her eru tað ofta undirlutakenslur og øvundsjúka frá hinum, sum spæla inn.

– Fólk í Føroyum tosa og tosa, men tey taka ongantíð nakra avgerð. Og tey eru eisini so sára bangin fyri at stuðla fólki, sum tora. Einaferð ynsktu øll sær eina café í Havn, sum kundi vera eitt nýmótans in-stað á sama støði sum í útlondunum. Caféin kom, mitt á Áarvegnum, men bert fáar mánaðir seinni mundi hon farið av knóranum, tí fólk hildu seg aftur, vísir Hans Fróði á.

Hans Fróði dugir ikki at siga, hví føroyingar eru soleiðis. Men besta boðið man vera, at tað altíð hevur so stóran týdning hvat hini halda. Og tað er ein hugsunarháttur, sum Hans Fróði vil hava lívið av.

– Til fótbóltsdystir syngja vit t.d. ofta, at »tað er bara ein Jens Martin«. Men tað er veruliga so. Tað er bara eitt eintak til av hvørjum fólki. Tað er bara ein Hans Fróði, so tí vil eg gjarna vera tann, sum eg eri. Eg leggi ikki so nógv í hvat hini halda, tí tað er bara eg, sum eri eg í øllum heiminum, vísir Hans Fróði á.

Hann heldur fram og sigur, at um vit alt lívið skulu laga okkum eftir hvat onnur halda um okkum, er vandi fyri, at vit púrasta at missa okkum sjálvi burtur.

Spurdur, um vit nakrantíð kunnu vænta at síggja Hans Fróða Hansen arbeiða við sínum førleikum her heima á klettunum, svarar hann, at tað væntar hann ikki.

– Kappingin í Føroyum er so ómetaliga hørð, tí har hava øll eina meining um hvussu Hanus og Janus skulu vera, klæða seg, ganga, ja, liva. Øll halda seg vita betur, og vænti eg ikki, at føroyingar hava nóg stóran tørv á einum sum mær, til at eg kann liva av tí. Men um fólk hava okkurt at spyrja meg um ella ynskja sær hjálp til eina broyting, so eru tey vælkomin at seta seg í samband við meg, sigur Hans Fróði Hansen at enda.







*Hans Fróði til arbeiðis. Her sæst Martin Berg áðrenn, ímeðan og aftaná*

## *Hans Fróði Hansen er útbúgvin:*

- Make-up artist
- Tað er"sminku-listafólk"
- Tikið prógv í Íslandi
- Veitir kunnleika um sminku, húðrøkt, litir o.t.
- Fashion stylist.
  Tað er"móta-stílmeistari/mótaskapari"
  Tikið prógv í Íslandi og London.
- Veitir kunnleika um snið, móta, hvørji klæðir hóska til hvørji fólk, litir o.t.
- Image Consultant.
  Tað er"útsjónds-ráðgevi"
  Tikið prógv í London.
- Veitir eina meiri grundleggjandi vitan um evnini í Fashion Stylist útbúgvingini. Veitir ein førleika at lurta eftir fólki, finna teirra innara persón og fáa hann at síggjast á útsjóndini eisini. At skapa samspæl ímillum tað innara og tað uttara í menniskjanum.
- Gevur førleika at arbeiða við sonevnd um »Image Branding« hjá fyritøkum. At finna og fullføra heilt serliga image'ið, sum hóskar júst til einstøku fyritøkuna, og fær hana at skilja seg frá mongdini.
- Fyri at sleppa inn á útbúgvingina, krevjast nógvar viðkomandi arbeiðsroyndir.
- Hans Fróði er ímllum heimsins yngstu Image Consultants í heiminum.
- Hann er somuleiðis tann einasti við hesi útbúgvingini í Norðanlondum.

## *Spurningar til Hans Fróða Hansen um alt innan móta og rák*

Er eitthvørt tú hevur hug at spyrja Hans Fróða Hansen um? Tað veri seg viðvíkjandi móta, styling, klæðum, hári, húðrøkt ella annað? Ynskir tú góð ráð, sum hann møguliga fær hjálpt tær við?

So kanst tú senda okkum ein mail, sum vit so senda víðari til hansara.

Send spurningin til okkara nýggju adressu: planetmoti@sosialurin.fo og vit senda svarið frá Hans Fróða aftur til tín.

Spurningar og svar verða eisini løgd út á nýggju ungdómssíðuna ung.fo Møguliga verða onkrir spurningar og svar eisini prentað á næstu ungdómssíðunum í blaðnum um 14 dagar. Um tit ynskja tað, kunnu tit sjálvandi vera ónevnd. Viðmerki tað bara í mailin tit senda okkum.

*Ungdóms redaktiónin*